## Kommunur kunnu spara

Í Danmark vísir ein kanning, at tær donsku kommunurnar kundu spart nógvar pengar, um tær keyptu teldur, kuldaskáp og perur, sum brúka lítlan streym. Elsparefonden er komin til ta niðurstøðu, at við at keypa ta minst orkukrevjandi útgerðina kundu kommunurnar spart umleið eina hálva milliard krónur í streymi um árið, og tað hevði harafturat skert $CO_2$-útlátið. Chriastan Jarby í Elsparefonden sigur við Politiken, at úrslitið av kanningini er týðiligt, og at nú ræður bara um hjá kommununum at fylgja tí.



## Størri dent á jólamannin

Jólamaðurin er eitt fyribrigdi, sum er kent um ein stóran part av heiminum, og tá fleiri halda, at hann kemur úr Grønlandi, eiga grønlendingar at fáa munandi meiri burtur úr honum í sambandi við ferðavinnuna. Tað heldur í hvussu er tað grønlendska ferða- og vinnuráðið, sum nú ætlar sær undir eitt átak á alnetinum, sum skal marknaðarføra Grønland sum landið hjá jólamanninum. Grønland skal sostatt kappast við Finnland, sum í fleiri ár hevur marknaðarført seg um land jólamansins við góðum úrsliti, sigur KNR.

# Skulu fiska fyri einar 30 miljónir krónur um árið

**- Nú skulu skipini klassast, og ymiskar ábøtur skulu gerast. Vit vænta, at skipini kunnu loysa í seinnu helvt av januar, sigur Mikkjal Hammer, sum saman við fleiri øðrum hevur keypt ísfiskatrolararnar, Navaran og Borgaran**

SKIPAKEYP
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað var ein fegin reiðari, vit hittu í telefonini í morgun – á veg úr Suðuroy og inn á Skálafjørðin at hyggja at skipunum, sum felagið TG Fish hevur keypt frá Føroya Banka.

Tað er felagið P/F Sjagaklettur, sum er størsti einstaki eigari í nýggja felagnum – og næststørstur er eitt felag í Scrabster í Skotlandi.

TG Seafood, sum rekur fiskavirkið í Hvalba, er eisini við, og um hetta felag er Delta Seafood á Tvøroyri partur í keypinum.

Mikkjal sigur, at talið av partaeigarum í nýggja felagnum, TG Fish, er út við fimmti.

### Trý loyvi

Sosialurin hevur skilt, at keypsprísurin fyri Navaran og Borgaran liggur um 28 miljónir krónur, men hetta tal vil Mikkjal Hammer ikki vátta.

Reiðarin á Sjagakletti, sum nú eisini verður reiðari á Navaranum og Borgaranum, sigur, at við í keypinum av ísfiskatrolarunum eru



*- Jú, sjálvandi eru vit spentir, og vit vóna, at hetta fer at eydnast okkum, sigur Mikkjal Hammer, reiðari*

eyka fiskidagar.

Hann vil ikki siga ítøkiliga, hvussu nógvir hesir eykadagar eru, men sigur, at vit hava skilt málið rætt, tá vit spyrja, um fiskidagarnir hjá einum av hinum skipunum, ið bankin framvegis eigur, eru við.

Føroya Banki keypti teir seks ísfiskatrolararnar í Klaksvík, Navaran og Borgaran, Fjalshamar og Nónhamar og Safir og Smaragd, á tvingsilssølu.

Sum skilst, verða teir fýra trolararnir seldir útaftur – við eykadøgum, soleiðis at teir tveir seinastu, sum eftir verða, ongar fiskidagar koma at hava.

Tað er Føroya Banki, sum hevur figgjað keypið.

### Skulu klassast

Mikkjal Hammer sigur, at Navarin og Borgarin skulu til klassingar, har serliga verður hugt at høvuðsmotorunum – umframt, at skipini skulu hava aðrar ábøtur.

- Enn er ikki endaliga gjørt av, hvar skipini skulu á beding, men vit vænta, at tey verða klár at loysa til fiskiskap seinnapartin í januar.



*Navarin og Borgarin, sum seinastu tíðina hava ligið í Saltangará, fara nú til klassingar, og síðan gongur leiðin til Suðuroyar, hagar tey eru seld*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Reiðarin heldur, at skipini eru í brúkiligum standi, sum hann tekur til.

Tríggir navigatørar eru knýttir at lemmatrolaranum Sjagakletti, og tað verða teir, sum koma at skiftast um brúnna, tá Navarin og Borgarin loysa. Hesir eru Tórhallur Randrup, John Martin Poulsen og Hanus Tausen – allir úr Hvalba.

### Fegnir menn

Suðuroyingar eru fegnir, og fólk eru spent, nú tað hevur eydnast at keypa hesar báðar ísfiskatrolararnar.

Í Hvalba eru menn við drúgvum royndum innan trolvinnu, og seinastu árini hava teir, sum reka eitt nú Sjagaklett og Steintór, víst í verki, at tað ber til at reka fiskiveiði – eisini í truplum tíðum.

- Jú, sjálvandi eru vit spentir, og vit vóna, at hetta fer at eydnast okkum. Undir verandi umstøðum skulu skipini helst fiska fyri í minsta lagi 30 miljónir krónur um árið, um raksturin skal hanga saman.

Mikkjal sigur, at skipini fara at landa, har mest fæst fyri fiskin, men hann vónar, at ein munandi partur av veiðini fer at koma upp á land og til virkingar í Hvalba.

Navarin og Borgarin skulu báðir skifta navn, men reiðarin sigur, at nýggju nøvnini verða ikki almannakunngjørd enn.

### Eingin viðmerking

Spurdur, um teir kanska liggja fram við eftir einum pari aftrat av teimum fýra, sum Føroya Banki eigur eftir, sigur Mikkjal Hammer, at tað hevur hann onga viðmerking til.

Hann avvísir ikki, men sigur avgjørdur:

- Tað havi eg onga viðmerking til.

# Jóhan Páll ynskir suðuroyingum góða eydnu

**- Vit umhuga støðuna, men í løtuni er ógjørligt hjá okkum at siga, hvat fer at spyrjast burtur úr, sigur Jóhan Páll Joensen, stjóri í Maru Seafood**

KLAKSVÍK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tey eru fegin í Suðuroy, men minni glað munnu tey vera í Klaksvík.

Og tó.



*- Vit umhuga støðuna nú, og eg tori í løtuni einki at siga um, hvussu verður frameftir, sigur Jóhan Páll Joensen, stjóri*

Jóhan Páll Joensen, stjóri í Maru Seafood, er als ikki nakar bittur maður, hóast tvey av skipunum, sum áður vóru undir hattinum hjá felagnum í Klaksvík, nú eru seld til Suðuroyar.

- Nei, eg eri slett ikki bittur. Í vinnulívi gongur upp og niður, og skalt tú vera bittur, kanst tú slett ikki vera við í vinnulívinum.

Jóhan Páll sigur, at hann fegin vil ynskja suðuroyingum tilukku við skipunum – og ynskja teimum góða eydnu, nú TG Fish hevur keypt Navaran og Borgaran, ið vóru frægastu ísfiskatrolararnir, sum felagið í Klaksvík átti.

- Sum vinnulívsmaður, hittir tú somu fólkini aftur og aftur, og tað ber onga leið at vera bittur, slær stjórin í Klaksvík fast.

### Støðan óviss

Spurdur, hvussu nú verður við virkseminum á Kósini, sigur Jóhan Páll, at tað dugir hann slett ikki at siga í løtuni.

- Sum er, er einki virksemi, og líkt er ikki til, at nakað verður tað, ið eftir er av hesum árinum.

Stjórin dugir heldur ikki at siga, at tað er hugsandi, at Kósin reisir seg aftur, soleiðis at virksemið kemur uppaftur at koyra fyrst í komandi ári.

- Vit umhuga støðuna nú, og eg tori í løtuni einki at siga um, hvussu verður frameftir.

Jóhan Páll sigur seg heldur ikki duga at meta um, hvørt hugsandi er, at eitt av pørunum, sum Føroya Banki enn ikki hevur selt, kann enda í Klaksvík.

Tað var Kristian Martin Rasmussen, reiðari, sum hevði eitt boð hjá Føroya Banka upp á allar seks ísfiskatrolararnar.

- Nei, eg dugi slett ikki at siga, um hugsandi er, um reiðarin framvegis hevur áhuga í nøkrum av teimum skipum, ið eftir eru, sigur Jóhan Páll Joensen, stjóri.